## Góður túrur

Nýggjársaftan kom Atlantic Navigator á Klaksvík við umleið 1.400 tonsum av surimi og umleið 300 tonsum av mjøli. Hesin túrurin byrjaði 16. november. Herfyri legði skipið 300 tons av surimi og nakað av mjøli upp í Ánunum, so við tí hevur Atlantic Navigator fingið umleið 2.200 tons hesar seks vikurnar. Sambært Norðlýsinum er manningarparturin hendan túrin væl oman fyri 50.000 krónur. Skipið landar í dag.

## Ferja avlýsti

Tað var rættiligt illveður í Danmark og Svøríki um nýggjárshalguna, og tað ávirkaði millum annað ferjusambandið. Eitt nú noyddist norska ferjan "Prinsesse Ragnhild" at avlýsa sína ferð úr Stavanger til Danmarkar. Meiri enn 1.000 fólk vóru farin umborð, men á vegnum gjørdi skiparin av at venda aftur, og so máttu ferðafólkini halda nýggjár inni á einum firði. Skipið hevði tó verið uttan fyri 12 fjórðingar fyrst, so tey fingu tollfrítt umborð.

# Fyrsti føroyingurin í ár var ein didda



*Fyrsti føroyingurin í árinum var ein lítil didda úr Klaksvík*



*Ein stolt stórasystur. 6 ára gamla Hanna Elsubeth við lítlusystrini, sum onki navn hevur fingið enn.*

**Fyrsti føroyingur í ár var ein didda úr Klaksvík, sum var fødd á Landssjúkrahúsinum klokkan 04.23 nýggjársnátt**

GLEÐIBOÐ

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Føðideildin á Landssjúkrahúsinum fekk í ár heiðurin at verða karmur um fyrstu føðingina í nýggja árinum. Og hetta hóast familjan, sum fekk lítlu diddunа, býr í Klaksvík. Foreldrini eru Alis Jacobsen og Jónleif Christiansen og eiga tey frammanundan 6 ára gomlu Honna Elsubeth, ið við hesum bleiv stórasystir.

Gentan vigaði 4200 g. og var 54 cm. long. Mamman var sett at eiga longu 19. desember, so diddan lat bíða eftir sær.

- Øll søgdu, at hetta fór at vera eitt jólabarn, men nú kom hon ikki fyrr enn nýggjársnátt, sigur Hanna Elsubeth, sum sjálv er ættað úr Skálabotni.

Av føðideildini siga tey, at tað er eitt sindur stuttligt at vita, hvat sjúkrahús fer avstað við fyrstu føðingini í árinum, og at tað fer ein lítil kapping fram millum sjúkrahúsini um tað.

- Annars hevur verið stak friðarligt her um øll jólini. So mammurnar hava ordiliga hugna sær við teimum smáu, og páparnir hava verið nógv til staðar, verður sagt av føðideildini á Landssjúkrahúsinum.